# Lønarsteðgur

ELI BRIMSVÍK
formaður í Havnar Handverkarafelag



Fíggjarmálaráðið við Jóannes Eidesgaard á odda, vil nú hava fakfeløgini, sum hava sáttmálar við tað almenna at strika lønarhækkanina, sum skal koma í gildið í heyst.

Um vit ikki ganga vit til tað, kunna vit rokna við, at eini 200 fólk hjá tí almenna verða søgd úr starvi. Hinvegin, ganga vit við til lønarsteðg, fáa vit álíkavæl onga trygd fyri, at fólk ikki verða uppsøgd. So her er líka vítt sum sítt.

Niðurstøðan hjá leiðandi búskaparfrøðingi er, at tað er at spara eftir reyv, um ætlaði lønarsteðgurin verður framdur, gangi útfrá, at teir vita eitt sindur meir um búskap, fiskastovnar og annað enn politikarar.

Heilt erligt? Hvat skula vit við búskaparfrøðingum, fiskifrøðingum og øðrum frøðingum, tá ið tað álíkavæl ikki verður lurta eftir teimum. Tað kundi verið nógv at spart við at sent allar frøðingarnar til hús, um tað er tað man vil, men tað hevði helst eisini verið tað reina kaos.

Fyrst er at siga, at tað neyvan eru fakfeløgini, sum hava ábyrgdina av, at undirskot er á fíggjarlógini. Hinvegin eiga vit øll at taka lógvatak fyri at samfelagið kann koyra, men tað eigur undir øllum umstøðum at verða so, at øll lyfta í felag. Tað er okkurt sum bendir á, at ætlanin er, at bert fakfeløgini skula bera byrðarnar, men tað gongur ikki.

Ein minsta treyt fyri, at vit skula verða við eigur at verða, at tunlarnir Norð um Fjall verða strikaðir á fíggjarlógini og, at onnur inntriv verða gjørd á vørur og annað, sum er neyðugt í húsarhaldinum.Skal pengur brúkast í Norðoyggjum, rokni eg við at tað eru nógv onnur øki at brúka teir til, og sum geva mundandi meiri arbeiðspláss enn tunnilin norð um fjall.

Í aðrar mátar má man siga, at hetta er einki minni enn ein háan av fakfelagsrørsluni.

Annfinn Kalsberg eigur uppskotið um lønarsteðg, fyri at spara landskassanum 60 milliónir, sum altso eru settar av til at byggja tunlar Norð um Fjall fyri.

Við øðrum orðum, fakfelagsrørslan skal gjalda fyri ein "varða"eftir ein fólkaflokspolittikara í Norðoyggjum. Ótrúligt, at ein javnaðarmaður leggur rygg til slíkt. Men tað vísir bert, at flokkurin er blivin stuðulsflokkur hjá Fólkaflokkinum. Øðrvísi kann man ikki tulka hettar.

Vóni at fakfeløgini, á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum, fara at vísa hesum uppskoti frá sær, í øllum føri, til vit síggja hvat annað landsstýrismaðurin kemur fram við í sambandi við sparingarnar.

# Á skótalegu

BERGLJÓT MADSEN

Tað vardi meg ikki, at eg nakrantíð skuldi fara á skótalegu, men nú á ellisárum hendi tað. Eg fór til Selatraðar við ommubørnunum á familjulegu hjá skótunum.

Eg var púra imponerað av, hvussu væl hetta veldiuga tiltakið var tilrættislagt. Tú kundi velja ímillum 25 ymisk virksemistilboð. Rógva í kano, gera og sigla við tunnuflaka, fara við GPS-ara til geocaching, mini-túr við telti og spritkøki, síga í "bjørgunum", dramaverkstað, sum dømi. Einaferð var skipað fyri stórari forðarenning har eisini runubað inngekk. Matur morgun, miðdag og kvøld, fyriuttan pylsur og búffar til eina stóra grill, sum altíð stóð klár.

Sum har var hugnaligt at vera. Tað ýddi av lívi. Allastaðni virksemi og spæl. Ommubørnini gingu á skattajakt, skutu við boga og píli, flugu við drekum, koyrdu í kassabili, smíðjaðu í gløðandi jarni, lærdu at gera mat á báli. Ommudótturin helt, at breyðið bakað á bálinum, var tað besta hon nakrantíð hevði smakkað. Tey svumu í hylunum og vermdu seg inni í saununi. Annars var tað deiligt at síggja øll hesi praktfullu børn og ungu stuttleika sær saman allan dagin, til vit savnaðust til hugnaløtu við legubálið um kvøldarnar. Nakað serligt fyri meg var sunnudagin at uppliva ta vøkru gudstænastuna undir opnum himli, har Bøgesvang so væl dugdi at tosa til allar aldursbólkar, so eisini tey heilt smáu lurtaðu.

Um alla leguna ráddi ein góður andi. Har stóðu nógvar góðar kreftir aftanfyri.

Hesir dagarnir eru fyri mær ein stór uppliving, og eg vil bera skótunum eina inniliga tøkk fyri hetta stórfingna tiltak.


## Ford Escape Limited

*– 4-hjólstrektur luksusjeepur*









Ford Escape Limited við 3.0 V6 bensinmotori (200 hk). Skrásettur fyrstu ferð í juni 2007. Hevur einans koyrt 25.000 km.

Bilurin er sera væl útgjørdur og hevur m.a. 4-hjólstrekk, aut. gear, leðursetur, fløguspælara til 6 fløgur, aircondition, el-rútar, el-spegl, elførarasetur, fjarstýrt centrallás, orig. 16" alufelgur, fartpilot, tokulyktir og takboylar.

Bilurin er sum nýggjur bæði innan og uttan og verður seldur, um hóskandi boð fæst.

**Ring 211996 ella senda ein teldupost til kho@post.olivant.fo**






Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

**Tel. 34 18 00**
**lysing@sosialurin.fo**

**Ring og fá ein prís!**

Sosialurin